Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingilín D. Strøm, løgtingsmaður

Svarari: Bárður Nielsen, løgmaður

Evni: Javnstøða í landsstýrinum

Spurningar:

1. Metir løgmaður, at tað er nøktandi, at eingin kvinna er landsstýrismaður í løtuni?
2. Heldur løgmaður, at javnstøða eigur at vera í landsstýrinum?
3. Ætlar løgmaður at gera nakað við manglandi javnstøðuna í landsstýrinum?

Viðmerkingar:
Í gjár setti løgmaður tveir nýggjar landsstýrismenn. Tað merkir, at nú eru sjey menn, sum umboða landsins leiðslu í Tinganesi. Eingin kvinna. Løgmaður hevur ábyrgd av at seta landsstýrisfólk og loysa landsstýrisfólk úr starvi, og tí hevur hann eisini einsamallur heimild til at broyta, at bara mannfólk eru umboðað í landsstýrinum. Nevnast kann, at Sambandsflokkurin eisini hevur framt eitt landsstýrismannaskifti í hesum valskeiðinum. Tá var tað eisini ein maður fyri ein mann.

Hetta er fyrstu ferð síðan 2004, at eitt landsstýri bara er mannað av monnum. Javnstøðunevndin hevur sagt, at hetta gongur ímóti demokratisku virðunum. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 7. januar 2022

Ingilín D. Strøm